UTTAN ÚR HEIMI

## USA trýstir ES

Amerikanska stjórnin hevur tikið eitt heldur óvanligt stig. Fyrr í vikuni var amerikanski varaverjumálaráðharrin, Paul Wolfowitz, í London, og har kunnaði hann bretsku stjórnina um, at USA vil hava ES at geva Turkalandi limaskap sum skjótast. Úr London fór Wolfowitz til Ankara.

Wolfowitz sigur, at sjálvandi er tað Evropa, sum skal taka avgerð um turkiskan limaskap í ES, men hann legði afturat, at amerikanska stjórnin er av teirri uppfatan, at ES verður sterkari við Turkalandi sum limi, og at turkiskur limaskapur fer at koma trygdini til góðar.

Fleiri ES-lond hava gjørt greitt, at Turkaland er ikki búgvið til limaskap í ES, og summir politiskir leiðarar tykjast eisini ivast í, um tað yvirhøvur er rætt, at Turkaland kemur upp í samveldið. Eitt nú hevur danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, fyrr víst á, at við Turkalandi sum limi fær ES mark við lond sum Iran og Irak, og tað heldur hann avgjørt ikki vera nakran fyrimun fyri evropeiska trygd.

## Gongur strúkandi

Meðan stjórnir víða um kæra sína neyð um búskaparliga afturgongd, kann russiska stjórnin fegnast um ta øvugta, tí í Russlandi gongur tað væl.

Russland arvaði eina stóra uttanlandsskuld frá gamla Sovjetsamveldinum, men tað stendur ikki á at gjalda skuldina aftur. Í ár gjalda russar 102 milliardir krónur av uttanlandsskuldini, og í fíggjarlógini næsta ár eru 131 milliardir krónur settar av til at gjalda uttanlandsskuld við. Kortini kann Aleksej Kudrin, fíggjarmálaráðharri vísa á avlop á fíggjarlógini fyri 2003.

Stjórnin í Moskva væntar, at inntøkurnar hjá ríkiskassanum verða 605 milliardir krónur næsta ár, og tað er met. Útreiðslurnar verða 586 milliardir krónur. Avlopið svarar til 0,6 prosent, sum kanska kann tykjast lítið samanborið við summi lond í Vesturheiminum, men sum má sigast at vera ein stórbroyting, tá hugsað verður um, at í nítiárunum var stórt hall á fíggjarlógini ár um ár.

## Hægri oljuskatt

Fleiri politiskir flokkar í Danmark herða nú trýstið á stjórnina fyri at fáa hana at hækka oljuskattin, so ríkiskassin kann fáa meiri burtur úr oljuinntøkuni í Norðsjónum.

Orsøkin til tað veksandi trýstið á stjórnina er, at sambært nýggjum tølum hjá búskapar- og vinnumálaráðnum slapp Dansk Undergrundskonsortium undan at gjalda 6,3 milliardir krónur í fjør, tí tann danska oljuskattaskipanin er so lagalig. Orsøkin er, at reglurnar heimila oljufeløgunum ein skattafrádrátt, sum svarar til hálva triðju ferðir tær íløgur, sum tey hava gjørt í Norðsjónum.

Sosialdemokratarnir og Danski Fólkaflokkurin ganga á odda í royndini at fáa stjórnina at broyta reglurnar. Danski Fólkaflokkurin hevur sagt, at vil Dansk Undergrundskonsortium, sum AP Møller eigur 39 prosent av, ikki sjálvboðið ganga við til at broyta verandi reglur, mugu myndugleikarnir áseta nýggjar reglur.

## Mafian hjálpti Berlusconi

Ein fyrrverandi mafialeiðari í Italia, Antonio Giuffre, avdúkaði í rættinum mikudagin, at tætt samband hevur verið millum mafiuna og flokkin Forza Italia, sum er flokkurin hjá Silvio Berlusconi, forsætisráðharra.

Undir avhoyringunum segði mafialeiðarin, at tað var mafian, sum setti seg í samband við Forza Italia í 1993. M. a. beyð mafian sær til at hjálpa valevnunum hjá flokkinum. Afturfyri skuldi Berlusconi, um hann seinni bleiv forsætisráðharri, skipa so fyri, at mafialimir, sum sótu í fongsli, fingu betri umstøður, og at tað almenna skuldi gevast við at leggja hald á fastar ognir hjá mafiuni.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at italski forsætisráðharrin er settur í samband við mafiuna. Hann hevur sýtt fyri at greiða frá viðurskiftunum, og tað hevur hann rætt til sambært italsku grundlógini.

# ES skal hava felags grundlóg

**Lond, sum sýta fyri at góðtaka uppskotið um felags grundlóg, kunnu missa limaskapin í ES, og undantøk verða heldur ikki góðtikin í framtíðini. Tað kann fáa avleiðingar fyri Danmark**

ES-BYGNAÐUR
*Árni Joensen*

ES-nevndin arbeiðir við einari ætlan um at broyta tann verandi bygnaðin í ES, og sum kann fáa umfatandi avleiðingar.

Eitt nú ætlar nevndin at strika ta regluna, sum sigur, at øll limalondini skulu vera samd, áðrenn nøkur broyting kann gerast í ES-sáttmálanum. Sambært donskum fjølmiðlum ætlar nevndin, at lond, sum hava eina aðra støðu enn meirilutin, skulu fáa tilboð um eina serskipan ístaðin fyri vanligan limaskap.

Hetta hevur vakt ans millum danskar politikarar. Danmark fekk nøkur undantøk frá ES-reglunum í 1993, men fær ES-nevndin sína vilja ígjøgnum, missa danir undantøkini, taka teir ikki undir við uppskotinum um eina felags grundlóg. Ein talsmaður hjá ES-nevndini segði við Jyllandspostin í gjár, at einki land verður tveitt á dyr, men nevndin kann heldur ikki góðtaka, at eini tvey ella trý lond oyðileggja møguleikarnar hjá hinum londunum.

Sambært Jyllandspostinum merkir hetta, at lond, sum ikki taka undir við felags grundlógini, kunnu fáa eina skipan sum EBS-sáttmálan, sum Noreg og Ísland hava við ES.

# Krevja forsetan frá

**Síðani mánadagin hevur aðalverkfall verið í Venesuela, har fakfeløgini krevja, at Hugo Chavez, forseti skal fara frá**

VENESUELA
*Árni Joensen*

Tað hevur verið sera ófriðarligt í Venesuela seinastu tíðina. Mánadagin byrjaði eitt aðalverkfall, og fakfeløgini siga, at tey fara ikki at helma í, fyrr enn Hugo Chavez, forseti leggur frá sær.

Tá hann kom framat fyri trimum árum síðani, lovaði forsetin at endurskipa samfelagið og at beina fyri tí ovurstóra sosiala ójavnanum í landinum, men hetta lyftið hevur hann ikki hildið. Tvørturímóti er ójavnin vorðin uppaftur størri, enn hann var, og nú hava tey nógvu mist tolið.

Chavez varð koyrdur frá í apríl, men tað eydnaðist honum at taka valdið aftur tveir dagar seinni. Ta ferðina var tað ein partur av herinum, sum hjálpti honum, men tað er ivasamt, hvørja støðu herurin nú hevur. Hinvegin tykjast tey fátæku framvegis styðja forsetan, tí í teirra eygum er hann framvegis tann einasti, sum kann hjálpa teimum.



*Hugo Chavez situr ótryggur í forsetastólinum í Venesuela*
Mynd: Reuters

# CIA hevur nú heimild til at drepa amerikanarar

**George W. Bush, forseti hevur givið fregnartænastuni CIA heimild til at beina fyri yvirgangsmonnum, sjálvt um teir eru amerikanskir ríkisborgarar**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Avgerðin hjá forsetanum hevur fingið nógva umrøðu í USA, tí fleiri halda, at hon er í stríð við tey grundlógartryggjaðu rættindini hjá amerikanarum. Onnur vísa harafturímóti á, at yvirgangsmenn mugu roknast sum fíggindar, og at forsetin tí hevur gjørt tað, sum rætt er.

- Ein yvirgangsmaður, sum ætlar sær at beina fyri tær, ger tað, sama um hann er amerikanskur ríkisborgari ella ikki, sigur Richard Shelby, sum er republikanskur senatorur í statinum Alabama.

Sambært tíðindastovuni AP skal CIA hava loyvi, áðrenn eitt drepandi skot verður latið av eftir einum amerikanskum ríkisborgara, og í summum førum skal sjálvur forsetin geva tað endaliga loyvið.

Ein tilburður av hesum slagnum hevur longu verið. Tað var tann 3. november, tá menn hjá CIA skutu eina rakett eftir einum bili í Yemen. Seks mans doyðu í álopinum, og seinni hevur tað víst seg, at ein teirra, Kamal Derwish, var amerikanskur ríkisborgari.

Amerikansku myndugleikarnir siga, at Kemal Darwish stóð á odda fyri einum yvirgangsbólki, sum varð avdúkaður í býnum Buffalo fyrr í ár. Tey avvarðandi vísa kortini á, at maðurin varð ongantíð skuldsettur ella ákærdur, og at hann tískil heldur ikki varð funnin sekur. Tey halda tí fast um, at í hesum førinum avrættaðu myndugleikarnir ein ósekan amerikanskan ríkisborgara, og tað er ikki í samsvari við amerikanska lóggávu.


Í kvøld er opið
til kl. 23.00







Komandi viku er cafeteria á flogvøllinum opið soleiðis

| | | |
|---|---|---|
| 10/12 | Týsdag | kl. 9-22 |
| 11/12 | Mikudag | kl. 9-20 |
| 12/12 | Hósdag | kl. 9-20 |
| 13/12 | Fríggjadag | kl. 9-20 |
| 14/12 | Leygardag | kl. 9-20 |
| 15/12 | Sunnudag | kl. 9-18 |

Vit bjóða:
Føroya best Rís a la'mande
Jóla Gløgg v/holukøkum
og alt gott frá køkinum



CAFETERIA
Á FLOGVØLLINUM

i
Sosialurin

Lesið
Sosialin

Til ber at melda seg sum lim í Oljutinginum í Vinnuhúsinum

Til gaman og álvara!

Mikukvøldið 11. desember kl. 19.00 verður tiltak í skeiðshølum Føroya Sparikassans, Yviri við Strond.

Fyrilestrarhaldarar verða:
**Marner Jacobsen**, stjóri í Føroya Sparikassa
**Finnbogi Ísakson**, journalistur
**Rasmus Magnussen**, stjóri í El & Tele

Tilmelding í Vinnuhúsinum á telefon 311864 ella um teldupost industry@industry.fo í seinasta lagi mánadagin 9. desember.

OLJUTINGIÐ
Petroleum Association of the Faroe Islands

Hús í Vági

Hús í Lágabø til sølu.

Tlf. 373874